Rúnarsteinur í Fámjin.

Eftir *Sverra Dahl.*

Inngangur.

Her skal verða greitt frá einum lítlum rúnarminni *suðuri í Fámjin, Suðuroyar sýsla.*

Tað er í grundini undrunarvert so fá rúnarminni eru í Föroyum samanborið við, hvat teir í hinum Norðurlondum hava; undrunarvert, tí at rúnirnar og alt, sum til tær hoyrir, er ein týdningarmikil partur av fornu felagsmenningini í hesum londum. Tí mega vit loyva okkum at halda, at eisini Föroyingar hava verið könir í hesi list, og at rúnarminni, úr steini og úr viði, hava verið væl fleiri enn tey, vit nú vita um at siga. Hetta tora vit at halda, tí okkum kunnigt eru fleiri sovorðin horvin, og tí at vit tessbetur enn eiga einstök eftir.

Tey rúnarminni av tí slagnum, sum tald kunna verða millum rúnarsteina, og sum higartil hava verið almanna kend, eru *Kirkjuböarsteinurin*[10],ið fyribils er tíðarsettur til o. u. 850 og *Sandavágssteinurin*[1],ið er tíðarfestur til o. u. 1200. Hvörgin teirra er prýddur við myndum ella öðrum, sum so mangir aðrar staðir, men so fátæksligir, teir sýnast, so bera teir tó boð um, at rúnir vórðu ristar her í víkinga- og miðöld; og tó at innskriftir teirra eru fáorðaðar, siga tær kortini ikki so lítið um sögu og um mál okkara.

Ómöguligt er ikki, at einhvör annar enn hesir er til frá hesum tíðarskeiðum, men hetta skal bara verða nevnt.

Her skal eina eitt sindur gjöllari verða hugt at einum lítlum rúnarsteini, sum, mær vitandi, ikki hevur verið umröddur fyrr, men sum ivaleyst man vera tess verdur.

Fámjinssteinurin.

I.

Um söguna hjá hesum steini havi eg fingið frásögn frá *harra J. Jacobsen, lærara,* sum eg her sigi stóra tökk fyri beinasemi hansara.

»So langt sum nakar veit, hevur hesin steinur ligið við vegkantin uttan fyri kirkjudyrnar.

Tá henda kirkjan, sum nú stendur, varð bygd í 1875 varð steinurin tikin burtur, har hann lá og lagdur til síðis so leingi sum arbeiðið uppá kirkjuna helt við, fyri at hann ikki skuldi blandast burtur millum aðrar steinar. Tá ið arbeiðið við kirkjuna varð at enda komið, varð steinurin lagdur aftur har, sum hann hevði ligið, og tey seinastu árini hevur hann ligið inni í forkirkjuni.«

II.

Hetta er ein lítil vakur steinur, so snöggur yvirhövur, at hann væl kundi verið tilhögdur, men kortini er hann trúliga helst stabbagrót, sum nógv er til av har um vegir.

Skiligt er, at hann hevur ligið úti óvardur leingi, av tí at hann er heldur nógv tærdur: kullur og poknur eru víða hvar í honum, einstakar flísar eru farnar av röðunum, innskriftin er í stöðum so nógv máað, at hon er ógreið.

Hann er 55 cm langur, 22,5 cm breiður og 20 cm tjúkkur. Innskriftin er í trimum reglum, hvör undir aðrari, í teirri ovastu eru — 4 rúnir — í teirri næstu 4 latínskir stavir, í teirri niðastu nakrir ólesandi stavir; greitt er hvörki, hvussu

nógvir teir hava verið, ella um hetta eru rúnir ella latínskir stavir.

1. mynd. Fámjinssteinurin. Stødd: o. u. 1:6.

Rúnarstavirnir eru 4,7 cm högir.

Latínsku stavirnir eru 4,0 cm högir.

Omanfyri reglurnar er högd ein foyra, sum nú er nakað máað, men tað tykist sum hon hevur verið högd nakað rundan um innskriftina sum ein umgerð; millum reglurnar eru ongar umgerðarfoyrur.

Tað ið her tí fyrst og fremst verður at gera, er at greiða tær fáu rúnirnar í fyrstu reglu, og vita um tað ber til, nærri at avmarka aldur teirra.

1. regla. Rúnarstavirnir, sum skulu verða lisnir frá vinstru til högru eru hesir:

ᚴ ᛒ ᛋ ᚠ

ᚴ Henda rún er ikki beinleiðis greið.

Forna rúnin ᚴ hevði ljóðvirðið *l*, og hetta skuldi so verið ein »stungin« *l* rún; men samanborið við aðru reglu, man hon her kortini, sum vit skulu fáa at síggja, helst skula verða lisin sum avlagaður rúnarstavur fyri *d*.

Tann forna norröna rúnin fyri ljóðvirðið *t* var ᛏ, men tá ið tað seinri var törvur á at hava serstakan stav fyri *d*, fær hon ein punt í, ᛏ. Hetta hendi einaferð í miðöld, tá menn gjördu sær ta rúnarslag, sum nú verður nevnt »stungnar rúnir«.

Fyrsta teir vita um hesa rún fyri *d* nýtta í Noregi er í 1197 (*Vinje stavkirkju*)[9], bls. 103. Somu rún hava vit á *Sandavágssteininum* o. u. 1200[1].

Uppaftur seinri, men kortini longu í miðöldini verður hesin puntur fluttur inn á stavin sjálvan, so rúnin verður annaðhvört ᛏ ella ᛏ Sermerkti miðkvisturin á rún okkara kann hava samband við sovorðnar, sum dömi eru um í íslendskum innskriftum.[2]

Men her á rún okkara vendir, sum tað sæst, ovari kvistur övugta vegin. Til tess er at siga, at *t* rúnin ᛏ ikki so sjáldan verður rist sum ᚴ, ið jú veruliga er *l* rúnin, men sum eftir samanhanginum má verða lisin sum *d*, og á hin bógvin kann fyri *l* verða skrivað ᛏ. Sum dömi skal verða nevnd innskrift í *Rödven kirkju, Romsdalen, Noregi*[9], bls. 107.

Eftir innihaldinum í innskriftreglum okkara, man hesin stavur vera av sama slagi: ein stungin *d* rún.

ᛒ Forni rúnarstavurin fyri *b* var annaðhvört ᛒ ella ᛒ, hesin seinri er nógv vanligastur í teirri stungnu rúnarröðini. Vit hava hann t. d. á *Sandavágssteininum*[1].

Tá ið seinri verður törvur á at hava serstakan stav fyri *p*, verður hann stungin soleiðis sum her ᛒ.

Tað eru so nógvar poknur í hesum steini, at ivasamt kann vera, hvat ið er högt og hvat ið er komið ella horvið av

öðrum ávum, men soleiðis sum hesir puntir standa, er neyvan ivi um, at talan er um stungna rún við ljóðvirði *p*.

ᛋ Tann forna norröna rúnin fyri ljóðvirði *s*ᛁ hevur vanliga sama snið í miðöld við, tó at fleiri enn henda verða nýttar. Men nakað um somu tíð sum sundurbýtingin hendir millum rúnirnar fyri *t* og *d*, hendir hetta sama við *s*-rúnunum, soleiðis at ᛁ ella ᛊ verða rúnartekin fyri *s* og ᛋ fyri *c* (z). Hesa ᛊ rún hava vit á *Sandavágssteininum*[1]; men seinri — í eftirtrúbótarskriftum — verður ᛋ rúnin fyri *s*.

Eitt dömi um hetta hava vit á einum kistlabotni á *Fornminnissavninum* (nr. 1176), hesin er tíðarmerktur: ANNO 1695.

ᚠ Rúnin fyri ljóðvirðið *f* er í teimum eldru rúnarröðunum altíð ᚠ, men í miðöld fær hon bogaðar kvistar sum her og t. d. á *Sandavágssteininum*[1]; og er hetta vanligt síðan (sí 2. mynd).



2. mynd. Latínska bókstavarøðin skorin við rúnum á kistlabotn (F. F. nr. 1176).
The latin alphabet written in runes.
Føroya Fornminnissavn reg. nr. 1176.

Við hesum kanningum skuldi verið prógvað, at hesar rúnir mega vera yngri enn Sandavágsrúnirnar, og helst ristar onkun tíð í seinra parti av miðöld, ella nærri, um ella aftaná trúbótina.

Skrivaðar við latínskum stavum verða tær:

D P S F

Harra *Magnus Olsen, professara,* veiti eg bestu tökk fyri vælvildarhjálp í ymsum ivamálum.

Viðvíkjandi tíðarfestingini sigur hann, at hesar rúnir, eftir eyðkennum teirra, eru »*yngre end den egentlige runeperiode i middelalderen*«, og at teir í Noregi hava steinar við sovorðnum innskriftum sum hesa »*fra tidlig efterreformatorisk tid*«.

2. regla. Stavirnir í aðru reglu eru, sum nevnt, 4 og eru vanligir latínskir stavir; triðji er nakað máaður, men kortini lesandi, og vit lesa her:

D P S F

Her er eingin ivi um at fyrsti stavur er *d;* tá ið allir hinir stavirnir eru teir somu í báðum reglum, er óivað góð grund at halda eisini teir fyrstu vera tað; og tí fyrsta rún er beint lisin sum ein stungin *d* rún.

At annar stavurin á myndini tykist at hava tvær bungur er av tilvild; steinurin er bara soleiðis máaður, við kanning á steininum sjálvum er greitt, at her er högt P.

Hví her eru högdir somu stavir við latínskum bókstavum og rúnum, er óvist, men hetta kann væl vísa, at steinurin, soleiðis sum vit sóu við rúnarkanningunum, er heldur ungur.

Tað skal kortini verða sagt, at í hinum Norðurlondum hava vit úr miðöld steinar við innskriftum bæði við rúnum og öðrum stavum (majusklum)[3,6]; og innrit við latínskum stavum saman við rúnum[5].

3. regla. Har eru skövur eftir nökrum nú ólesandi stavum; um hetta eru rúnir ella annað er ikki at siga. Hin seinasti kann so dánt hómast og man helst vera eitt 3 tal ella heldur eitt 8 tal. Havi vitað um tað ber til at lesa regluna sum ANNO, men haldi kortini her heldur hava verið árstal.

III.

Spurningurin verður nú, hvussu innskriftin eigur at verða týdd, tá ið, sum her, bara 4 stavir eru um at gera.

Tað vil so til, at teir í Noregi, sum frammanundan nevnt, hava steinar við somu innskriftum, sum teir hava týtt soleiðis, at fyrsti stavur er fornavn á manni, annar og triðji siga hvörs sonur hann er, og fjórði er staðarnavnið.

Hetta sama kenna vit so væl her á landi, at menn fyrr og enn merkja amboð síni og annað við forbókstövum sínum; nú vanliga bara við teimum, men fyrr sum oftast bæði við sonarnavni og staðarnavni. Dömini eru mong, her skal eina verða víst á eina fjöl í *Kaldbaks kirkju*, har teir, sum kirkjuna smíðaðu, Anno 1835, hava skorið növn síni soleiðis: növnini eru 8, her skulu bara verða nevnd tvey): D. P. S. K. F. — J. B. S. K. B. — K. F. merkir Kollafjörður — K. B. merkir Kaldbak.

Innskriftin má tí verða týtt: *D* er fyrsti stavur í navni á einumhvörjum manni, *P* er forbókstavur faðirsnavns hansara, *S* er fyrsti stavur í s(on), og *F* forbókstavur bygdarnavnsins; og koma á henda hátt til tað úrslit, at hesin steinur er settur til áminningar um mann í Fámjin:

D(.....) P(.....s) S(on) F(ámjin).

Hvör ið hesin maður var, sigur steinurin tessverri einki um, so longur koma vit ikki henda vegin; men tað slepst neyvan undan, at ymsar sagnir[7,8] og skjöl[4]haðan úr bygdini har menn eru umtalaðir, hvörs növn byrja við somu bókstavum sum hesum á steininum, renna í huga í hesum viðfangi. Hetta mál skal tó ikki verða nomið við her, hetta krevur gjöllari rannsóknir, men vit skulu heldur vita, um steinurin er ikki förur fyri at siga nakað meira.

IV.

Sum sagt er hann funnin í kirkjugarðinum, við tí skuldi verið náttúrligt at hildið hann vera gravstein (við rúnum) frá tíðarskeiðinum um, ella stutt aftaná trúbótina. Slíkir gravsteinar eru kendir t. d. í Svöríki so sum *O. v. Friesen*[5], bls. 239, sigur frá: Ännu på 1500 talet bruckas icke så aldeles sällan runor på gotländska gravstenar.

Hetta skuldi so eisini víst á, at kirkjan hevur staðið á sama staði tá sum nú (sögn er um bönhús á öðrum staði); og at bygdarnavnið tá var Fámjin, tað ið vit kortini annars vita.

Áhugaverdur er hann longu sum gravsteinur — eisini

teir eru fáir her í Föroyum frá eldri tíð — við at vera vitnisburður um, at menn í Fámjin tá vóru so mentaðir, at teir heiðraðu minni teirra farnu á henda hátt. —

Bara hetta gevur okkum ein glotta inn í lívsviðurskifti teirra í bygdini, og væl aðrar staðir í Föroyum við, um hetta mundið. Hesir menn hava dugað skrift, bæði rúna og latínska; ein frásögn, sum er verd at geva gætur, tí at hon vísir, at teimum hevur verið törvur á og áhugi fyri hesi list.

Skal so vera, krevst eitt minstamát av andiligari menning, og at lívskorini hjá monnum eru so mikið trygg og góð, at teir fyri ein part eru leysir og fríir av stöðugum stríði fyri tí mest neyðuga og átroðkandi til síni og seg. Hetta ber so í sær, at teir eiga eftir megi og stundir at hugsa um og fáast við mál, sum liggja uttanfyri dagligt strev á landi og sjógvi, hava virðing og áhuga fyri tí farna, teimum farnu, og framtíðini.

Men fram um alt sigur hesin steinur okkum, at teir hava dugað rúnir, at rúnarkunnleikin hevur hildið sær livandi í Föroyum frá o. u. 850 (Kirkjubö) um (Sandavág) o. u. 1200 og til Fámjin o. u. 1550—1600 árini.

At vit í Föroyum og í eini so fjarskotnari bygd sum Fámjin serliga, kundu væntað at funnið rúnir varðveittar upp í tíðina, skuldi verið náttúrligt, men so hövdu vit væntað at funnið tær í einumhvörjum eldri sniði; so er tó ikki, hesar rúnir okkara hava sama snið, sum tær nýttar vórðu í Norðurlondum í seinraparti av miðöld og í nýggari tíð, og sigur hetta greitt, at Föroyingar, Fámjiningar í minsta lagi, hava haft samband við grannar sínar eisini í hesum tíðarskeiði, ikki bara handilssamband, men eisini menningarsamband, sum teir ikki eina hava notið, men nýtt í verki.

Samandráttur.

Vit hava í Fámjin ein lítlan stein við rúna- og latínskastavainnskrift, sum samsvarandi sniði rúnanna verður tíðarfestur til o. u. seinra helming av 1500-árunum ella eitt sindur seinri.

Innskriftin,ið er D P S F, verður lisin sum forbókstavir í navni á einum manni í Fámjin, og verður hildið, at steinurin er gravsteinur settur hesum manni til áminningar.

SUMMARY

A runic stone from *Fámjin, Suðuroy*, is discussed. Before being deposited in the church, the stone had been laying in the churchyard for as long as is remembered. The inscription consists of three lines. The first has four runes; immediately below this is the second line with four Roman letters, the same as the runes: D. P. S. F. The third line, immediately below the second, is now illegible, but most likely gave the date. The shape and characteristics of the runes allow us to date the inscription somewhere shortly after the Reformation and the object itself is thought to be the gravestone to a man D... P... S(on) F(ámjin).

BÓKMENTIR

1. *Bröndum-Nielsen, Johs.:* Sandevåg Runestenen. Aarb. for nordisk Oldkyndighed og Historie. Köbenhavn 1923.
2. *Bæksted, A.* :Islands Runeindskrifter (Bibl. Arnamagnæana, II, 1942), bls. 38.
3. Danmarks Runeindskrifter. Köbenhavn 1942, teigur 849.
4. *Degn. A.:* Færöske Kongsbönder 1584—1884. Thorshavn 1945, bls. 282.
5. *Friesen, Otto v.:* De svenska runinnskrifterna. Nordisk Kultur VI, bls. 234 og 239.
6. *Friesen, Otto v.:* Runorna i Sverige. Uppsala 1928, bls. 81.
7. *Hammershaimb, V. U.:* Færösk Anthologi. Köbenhavn 1891, bls. 376.
8. *Jakobsen, J.:* Færöske Folkesagn og Æventyr. Köbenhavn 1898—1901, bls. 24.
9. *Olsen Magnus:* De norröne runeinnskrifter. Nordisk Kultur VI, bls. 83 f.
10. *Wimmer, L. F. A.:* Die Runenschrift. Berlin 1887, bls. 304—322.